# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Lønartrýst frá venjarunum

**Tað er vandi fyri, at økt slagkraft frá venjarunum trýstir feløgini enn meira á fíggjarsíðuni komandi árini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fleiri av føroysku fótbóltsfeløgunum hava sera trupult við at fáa fíggjarendarnar at røkka saman í løtuni.

Fyrst og fremst eru tað mest sum eksploderandi lønarútreiðslurnar seinnu árini, sum hava kroyst feløgini, og tá inntøkugrundarlagið ridlar, nú fíggjarlig niðurgongd er í samfelagnum, er støðan vorðin heilt akutt hjá fleiri feløgum, sum longu undan hesum mest sum ridlaðu á fíggjarligu eggini.

Umframt hetta, so hava feløgini nú eisini fingið tveir aðrar og tungar postar at dragast við. Annað er, at landsstýrið herfyri kom við nýggjum ásetingum um serliga ítróttarpartin av útlendingalógini. Hetta ger, at lønarkravið til útlendskar spælarar nú er hægri, enn tað hevur verið.

## Nýtt venjaravápn

Og hartil er nú álvarsligur vandi fyri, at venjaralønirnar verða kroystar uppeftir.

UEFA-krøvini til FSF hava borið við sær, at tað í dag er rættiliga avmarkað, hvør kann virka sum venjari hjá liði í fremstu deildunum.

Fyri at standa á odda fyri Formula-liði krevst, at venjari hevur sonevndan A-lisens. Er talan um útlendskan venjara, so er minstalønin til hendan í fyrsta lagi treytað av útlendingalógini, og í øðrum lagi eru fleiri dømi um, at hesir gardera seg munandi betur í sáttmálanum, enn føroysku starvsfelagar teirra hava gjørt.

Og í øðrum lagi merkja krøvini, at útboðið av venjarum við neyðugu pappírunum í løtuni er rættiliga avmarkað. Marknaðarkreftirnar plaga at viðføra, at eitt lágt útboð gevur ein høgan prís, og sum skilst er tað eisini hetta, sum fleiri av feløgunum merkja í løtuni. Nevnliga at venjararnir trýsta lønarlagið upp, tí feløgini ikki hava møguleika at siga nei-takk og ístaðin hyggja aðrar vegir.

## Vilja hava rætt

Samstundis eru føroysku venjararnir nú í holt við at stovna sítt egna lítla fakfelag. Tankin er als ikki nýggjur, og millum annað royndi Kurt Mørkøre at skipa eitt slíkt felag, tá hann var venjari hjá B36 í 2007. Millum annað førdi Kurt Mørkøre tá fram, at føroyskir venjarar alt ov lætt lótu seg kroysta av feløgunum, sum als ikki virdu hvørki setunar- ella uppsagnartreytir. Og hetta tykist nú vera nakað, sum venjararnir ikki vilja finna seg í longur.



16 Ítróttur Sosialurin [ Nr. 111 - 13. juni 20

ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Vandin er, at tað ikki longur verður gjørligt a... føroyskar venjarar til bestu d...*
*Kurt ...*

# Venjararnir krevja sín rætt

**Ansa venjararnir sær ikki sjálvum, er tað eingin annar, sum ger tað. Vandin kann vera, at føroyskir venjarar ikki longur vilja vera partur av spælinum hjá feløgunum, heldur Kurt Mørkøre. Hann hevur tikið stig til, at føroyskir venjarar kunnu fáa tryggari arbeiðsumtøður**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

*Føroyska venjarastættin er í vanda, um »hópuppsagnirnar« hjá feløgunum halda fram*

- Í nógvar mátar føli eg tað, sum eru bæði feløg og venjarar um at missa tamarhaldið á sær sjálvum. Eg var venjari í Føroyum í 2002, og tá fingu seks venjarar sekkin í bestu deildini. Og higar til í ár hava fýra venjarar longu fingið sparkið. Tá er í øllum førum nakað, sum bendir á, at sambandið við veruleikan er ikki altíð líka gott.

Soleiðis sigur Kurt Møkøre, sum í ár er venjari hjá B36. Hann sigur seg snøgt sagt vera skelkaðan av gongdini í føroyskum fótbólti, har feløg ferð eftir ferð velja at turka minni heppin úrslit av upp á venjaran, uttan at nøkur sum helst fyrilit verða tikin.

- Tú hevur jú ikki eitt óavmarkað tal av venjarum til bestu deildina. Ikki minst, nú tað verður kravt, at vit skulu hava A-venjaraprógv. Vandin er, at tað ikki longur verður gjørligt at finna føroyskar venjarar til bestu deildina, og so er ikki nógv vunnið. Tí haldi eg, at vit venjarar eiga at standa nógv betri saman, enn vit gera.

## Standard-treytir

Tað eru sjálvandi ymsir lutir, sum kunnu betrast, tá tosað verður um treytir hjá venjarum. Men sambært Kurt er ein av hesum í øllum førum, at fáa nakrar greiðar setanar- og ikki minst uppsagnartreytir.

- Eg eri sjálvur limur í norska venjarafelagnum, og har er ein standar-sáttmáli, sum feløg og venjarar skulu fylgja. Í løtuni arbeiða vit við at gera ein føroyskan standard-sáttmála. Uppgávan hjá venjarafelagnum verður so at fáa hendan nýttan, tá nýggir venjarar verða settir.

Hóast tað er trupult at fáa nakran venjara at úttala seg ítøkiliga, so er nógv, sum bendir á, at hóast uppsagnartreytir eru í einum sáttmála, so verða hesar ikki hildnar, tá venjari verður koyrdur. Er hetta eisini nakað, sum venjarafelagið kann virka fyri.

- Tað er sjálvandi eitt av málunum. Taka vit Noreg sum dømi, so stilla venjarafelagið alt fyri eitt upp við sakførara, um trætumál av hesum slag stinga seg upp. Og tað haldi eg avgjørt eisini vildi verið ynskilligt her hjá okkum.

- Um ikki annað, so kundi hetta fingið feløgini at hugsað seg betri um, áðrenn tey taka eitt so álvarsamt stig. Fyri mær at síggja er støðan í løtuni tann, at venjarar verða sekkjaðir púrasta uttan fyrilit. Feløgini vita nóg illa, hví tey gera tað, og enn minni vita tey, hvat skal henda aftaná. Vónin er bara, at sonevnda venjaraeffektin skal geva eina seks stig næstu dystirnar, og leggjav tey vertin á, at venjarar eisini eru persónar við familju og føstum útreiðslum til hús og heim.

## Akutt neyðugt

Enn er nýggja átakið hjá venjarunum bert í føðingini, men stendur tað til Kurt Mørkøre, so verður borið skjótt at við hesum.

- Venjarafelagið hevur áður mest verið ein áhugabólkur – og ikki eitt fakfelag. Men eg haldi, at tað er neyðugt, at vit fáa regulerað nøkur viðurskifti heilt skjótt. Og er tað neyðugt, so gangi eg gjarna á odda í hesum. Vandin er jú, at vit missa føroysku venjararnar í bestu deildini, og tað kann ongan tíð vera gott. Skal ein venjari í dag gera sær vónir um at venja lið í bestu deildini, so skal hann investera bæði tíð og pening í sína útbúgvin... Og tá er ikki annað en... rímiligt, at ein ávístrygd e... starvinum.

## Rúsdrekkasøla undrar DBU og UE...

Tað er nú ikki bert í Føroyum, at spurningurin um sølu av øli til fótbóltsdystir verður viðgjørdur.

Í Danmark er málið eisini komið á breddan eftir tilburðin í Svøríkis-dystinum, har ein áskoðari leyp inn á vøllin eftir dómaranum.

Maðurin, sum leyp inn á vøllin, hevur í rættinum greitt frá, at hann helst hevði drukkið ov nógvar øl. Og tað hevur fingið DBU og UEFA at seta spurnartekin við tað, sum gongur fyri seg beint uttan fyri fótbóltsvøllin.

- Eitt er, at loyvini eru í lagi. Eitt annað er signalvirðið í hesum. Hetta er jú á markinum til beinleiðis sølu á gøtuni, sigur aðalskrivarin í DBU, Jim Stjerne Hansen, við Ekstra Bladet.

Aðalskrivarin, sum eisini er limur í disciplinernevndini hjá UEFA, sipar til viðurskiftini kring Park...

## Skeinkja til VIP-ar...

Hóast vanligi áskoðarin ikki sleppur at fáa sær eina bjór ella annan rúsandi løg til altjóða dystir, so eru tó onnur á stadion, sum væl kunnu fáa sær nøkur gløs.

*Longu fyri hálvum øðrum ári síðani gjørdi Kurt Mørkøre eina roynd at savna føroysku venjararnar í eitt slag av fakfelag. Nú tykist hetta vera ávegis*

## KÍ verður umskipað

**Á eykaaðalfundi tann 27. desember verða broytingar framdar fyri fremstu fótbóltsfeløgini hjá KÍ**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sáttmálarnir við útlendsku spælararnir verða ikki longdir. Bjarni Jørgensen verður ikki í hópinum hjá KÍ, og tað sama er nú eisini galdandi fyri Rógva Jacobsen.

Fíggjarkreppan nívur eisini hjá KÍ, har stórar skerjingar verða framdar í løtuni.

- Eg fái ikki sagt so nógv annað enn tað, sum er nevnt omanfyri. Men tað verða nakrar bygnaðarbroytingar í Sp/f KÍ, sum rekur liðini í fremstu mans- og kvinnudeildini, sigur Johan Lützen, sum er fjølmiðlatalsmaður fyri KÍ.

- Vit hava eykaaðalfund tann 27. desember, men í aðrar mátar fái eg ikki sagt meira enn tað sama, sigur Johan.

Formaður í KÍ og nevndarformaðurin í Sp/f KÍ, er Tummas Lervig, men hann var staddur umborð á Norrønu, tá hesar reglur vórðu skrivaðar, og tí bar ikki til at fáa nakra viðmerking frá honum.

Útlendsku spælararnir, sum hava verið í KÍ í ár, eru Milic Curcic, Rodrigo og Jow Zeuwe. Hartil hevði KÍ seinnu helvt av kappingarárinum leigusáttmála við HB um Emil N. Leifsson, og hesin verður ikki longdur, skilst.